# nini eru ein gáva til okkum

## FAKTA

**Navn:** Per Stig Møller
**Føddur:** 27. august 1942
**Útbúgving:** Studentur 1961. Mag. art á Københavns universitet 1967. dr. Phil 1973
**Starvsroyndir:** Mentanarredaktørur á Danmark Radio 1973-74. Souschef í mentanar- og samfelagsdeildini 1974 og aftur 1976-79. Programleiðari 1979-84. Lektor á Sorbonne í París 1974-76. Arbeiddi á Berlingske Aftenavis og Berlingske Tidende 1969-72. Bókmentaredaktør á B.T. 1967-69
**Politiskar royndir:** Valdur í Fólkatingið í 1984. Formaður í Konservativa flokkinum 1997-98. Limur í Evroparáðnum 1987-1990 og frá 1994. Umhvørvisráðharri 1990-1993. Uttanríkisráðharri 2001-

hava verið í heimurin seinastu áratíggjuni.

– "Sáttmálin millum ættarliðini" snýr seg um, at vit virða tey, sum vóru undan okkum. Vit skulu ikki oyðileggja tað, sum ættarlið undan okkum hava bygt, tí vit liva bara einaferð, og eftir okkum kemur eitt nýtt ættarlið. Tekur tú eitt nú umhvørvispurningin, so síggja vit umhvørvið sum eitt náttúru virði, ið vit hava fingið frá okkara forfedrum. Velja vit til dømis fullkomiliga eirindaleyst at kapitalisera allan fiskin, verður einki hjá komandi ættarliðum at fiska, og tá virða vit ikki sáttmálan millum ættarliðini sigur Per Stig Møller.

Spurdur, hvørji høvuðsmál konservativir flokkar eiga at seta sær í framtíðini, svarar uttanríkisráðharrin málið eigur at vera at samantvinna individuella frælsið við sosialari ábyrgd.

– Vit skulu hava eitt samfelag, har staturin skal vera nóg sterkur til at taka sær av teimum veiku, men ov veikur at knúgva tey sterku. Samfelagið skal seta treytir fyri borgararnar, men vit skulu samstundis eisini virða individuella frælsið. Fyritøkur mugu sleppa at virka frælst, tí tær eru lokomotivið í okkara vælferðarsamfelag. Konservatisman vil taka sær av teimum veiku í samfelagnum, og fyri at gera tað, mugu vit hava pengar í kassan til at gera íløgur í pensjónir og útbúgving. Pengarnir í okkara kassa skulu fyritøkurnar tryggja okkum við at útflyta teirra vørur, vísir Per Stig Møller á.

### Floksskipanin

Seinastu 30 árini hava sonevndu virðisløddu økini verið gróðrarbotnur fyri fleiri nýggjum flokkum í Evropa.

Í Danmark komu Kristligu demokratarnar í kjalarvørrinum av liberaliseringini av porno, og tú kanst eisini av røttum siga, at Dansk Folkeparti hevur sínar røtur í innflytaratrupulleikanum í Danmark. Á sama hátt hava eitt nú Teir Grønu í Týsklandi vunnið seg fram millum størstu flokkar í Týsklandi í kjalarvørrinum av umhvørvistrupulleikunum.

Spurdur, um størri áherðslan á nýggju evni sum eitt nú yvirgangur, harðskapur og menningarhjálp fara at leggja lunnar undir nýggjun flokkar í framtíðini, svarar Per Stig Møller:

– Tað veldst um, hvussu meira klassisku flokkarnar fara at duga at yvirtaka nýggju evnini. Vit hava longu nú fingið fleiri flokkar, ið hava sítt grundarlag í evnum, sum klassisku flokkarnir ikki megnaðu at taka til sín. Persónliga minnist eg, at eg talaði ímóti, at vit Konservativu fóru ov sterkt út í kjakið um innflytararnar í Danmark, men tað var kanska eitt mistak, tí Dansk Folkeparti hevur sanniliga útnytta henda trupulleikan til fulnar. Hinvegin, so varð umhvørviøkið ongantíð til ein flokk í Danmark, tí vit Konservativu tóku økið til okkum alt fyri eitt, tá umhvørvistrupulleikarnir tóku seg upp í áttatiárunum, vísir Per Stig Møller á.

Danski uttanríkisráðharrin leggur afturat, at tað kann væl hugsast, at gamla styrkisbýtið við Radikala Vinstra, Vinstra, Konservativu og Javnaðarflokkinum, sum hevði sín uppruna í ídnaðarsamfelagnum, fer at broytast, tá nú onnur mál eru farin at stinga seg upp í politiska kjakinum. Dansk Folkeparti er eitt frálíkt dømi um hetta, tá flokkurin broytti gamla styrkisbýtið, tá flokkurin óvæntað gjørdist triðstørstur á fólkatingsvalinum í 2001.

### Nýtt snið

Gud, kongen og fædrelandet. Hesi trý hugtøkini vóru sambært konservatismuni grundarlagið undir gamla ídnaðarsamfelagnum. Í tráð við alsamt størri globalisering er grund-arlagið undir ídnaðarsamfelagnum burtur, tí nýggjar skipanir hava tikið seg upp. Gamlar siðvenjur og virðir takka fyri seg, meðan nýggi post modernaði heimurin gevur okkum nýggjar umstøður og fortreytir í gerandisdegnum

*Hvat leggur tú í hugtakið Gud, kongen og fædrelandet í dag?*

– Eg haldi framvegis, at hasi hugtøkini eru kjarnan í okkara samfelag, men tey skulu nútímansgerast. Gud stóð fyri religón og religiónsfrælsi, og í fluttari merking kann tað í dag standa fyri tollyndi, har fólk í okkara samfelag skulu hava frælsið til at hava eina religión, sum tey kenna seg væl í.

– Leiklutin hjá kongi kann í dag flytast til okkara rættarsamfelag, har vit øll skulu fylgja somu lógum. Vit skulu ikki hava eitt uppbýtt samfelag, har tú t.d í Tórshavn hevur nakrar lógir, meðan tú eitt nú í Vágum hevur Sharialóggávuna, tí tað gongur snøgt sagt ikki. Vit mugu hava felags lógir í einum samfelag, sum øll verða noydd at halda.

– Fædrelandet vil eg yvirføra til tjóðina, sum við sínum siðvenjum og virðum hevur ein týðandi part í okkara samfelag. So sum sagt er Gud, kongen og fædrelandet framvegis galdandi í konservativum politikki, men bara í einum broyttum sniði.

### National staturin

Herðnaðarmál og geopolitikkur. Undir stórum pørtum av kalda krígnum vóru hetta økini, sum national staturin mátti góð-taka vórðu viðgjørd á altjóða stigi. Hinvegin hevði national staturin fullan ræðisrætt yvir fíggjarmálum, vinnumálum, lógarmálum, umhvørvismálum os. fr.

Hetta býtið millum nationalan og altjóða politikk hoyrir í dag eini fortíðini til. Rákið seinnu árini hevur verið, at national staturin hevur latið størri og størri lut av sínum avgerðarrætti til altjóða felagsskapirnar.

At ES, WTO, NATO og ST hava yvirtikið fleiri av uppgávunum hjá national statinum, hevur varpað nýtt ljós á national statin sum skipan í altjóða samfelagnum.

Vit hava spurt Per Stig Møller, hvørjar uppgávu konservativir politikarar halda, at national staturin skal røkja í einum heimi, har yvirnationalu felagsskapirnir fáa størri og størri ávirkan.

– Hóast menniskjur og vørur flyta so skjótt sum ongantíð áður, so er tað ómetaliga týdningarmikið, at vit ikki ímynda okkum ein heim uttan national statirnar. Tað ber snøgt sagt ikki, at vit taka týðandi avgerðir uttan nationalu statirnar. Vit fara altíð at hava okkara uppruna í mentan og siðvenjum, sum er knýtt at national statinum. Eftir mínum tykki skal national staturin vera byrjanarstøðið fyri tí globala, ella sum eg plagi at siga: Tað nationala er tað basala í tí globala, tí annars verður einki skil í.

*Hvørjar uppgávur eigur nationalstatinum at lyfta?*

– Eg haldi, at fremstu uppgávurnar hjá national statinum skulu vera á sosiala økinun, innan útbúgving og á mentanarøkinum, svarar Per Stig Møller stutt og avgjørt.

